# Tá »M/S Hjørdis« bra

Sunnudagin 26. juni verður Hjalmar Joensen í Fuglafirði, Hjalmar í Tøðuni 75 ár. Saman við hesi føðingardagsheiolsan verður eisini greitt frá hendingini í 1954, tá ið M/S Hjørdis úr Fuglafirði brann undir Grønlandi og sakk. Hjørdis var ein fransaskonnart, umbygd til trolara, merkt til 186.44 tons. Hon var umbygd á B.M.W og kom aftur á Fuglafjørð 31. juli 1946. Hjørdis varð bygd í St. Malo 1921 og æt tá »Jeanne & Jeannine« . Fa. »S. P. Petersen's Eftf.« keyptu skonnartina 17. febr. 1930.

*Frits Johannesen*

Hjalmar er sonur Andreu og Olivinus Joensen í Tøðuni í Fuglafirði. Skyldskapur var ímillum Ansastovu í Oyndarfirði og Tøðuna. Olivinus var sonur til Jógvan í Tøðuni, sum var ættaður av Hellinum, men var fosturbarn av Toftum og kom við fastrini, Margrethu, seinnu konu Sakarisar-Jóannesi undan Kuldarasteini í Oyndafirâi til Fuglafjarðar, tá ið hesin fór at handla fyri Bekkers handil.

Kona Jógvan bleiv rópt fyri Sjúrða-Sigga og var systir Ansa-Kathrinu, sostatt vóru abbi, Daniel Anthoniussen, bátasmiður úr Oyndarfirði, og Olivinus, systkinabørn. Sjúrða-Sigga og Ansa-Kathrina vóru ættaðar úr Fuglafirði - døtur Sjúrð við Gjógvará og seinnu konuna, Jóhannu úr Miðtúni av Kirkju.

Hjalmar giftist við Helmu hjá Gordoni 1957. Helma doyði 1999 72 ára gomul eftir drúgva parkinsonsjúku, sum nívdi hana í mong ár, men sigast má um hana, at tignarliga flutti hon fótin eftir tún og stræti øll hesi tungu ár.

Mangan, tá ið vit hava hitst, hevur Hjalmar umrøtt , tá ið Hjørdis brendi í Grønlandi l954 og sakk. Onkuntíð havi eg sagt við hann, at forvitnisligt hevði tað verið at skriva eitt sindur um hetta og kanska sett tað í bløðini. Nú maðurin fer um tey sjeytifimm, var eg ein dagin inni á gólvinum hjá honum, og skifti orð við hann um hesa hending. Havi sostatt fest okkurt á blað, hvussu hetta barst á. Eg havi eisini tosað við Evald Johannesen, úr Fuglafirði, sum eisini var við henda lagnutúr.



*Hjalmar Joensen í Fuglafirði fyllir 75 ár í morgin, 26. juni. Frits Johannesen hugleiðir í hesi føðingardagsheilsan eisini um tann vanlukkutilburðin í juni í 1954, tá hann misti tummilin*

### Hjalmar missir tummilin

Hetta var á várið undir Grønlandi á Fíla bank. Hjørdis fór avstað seinast í mars mánaði. Sofus Olsen í Rituvík var skipari, Magnus Olsen í Rituvík var 1. stýrimaður og Theodor Johannesen (faðir) var 2. stýrimaður. Millum onnur før, sum royndu undir Grønlandi hetta árið, vóru Viðoyggin og Polarfarið. Eisini vóru bæði føroyskir og íslendskir trolarar á feltinum. Rituvíksingar høvdu silgt t. d. við Egil Reyða. Eingin ivi er um, at Sofus hevði samband við Egil Reyða, meðan teir fiskaðu, so teir vistu hvør av øðrum, og nørdi hetta um fiskiskapin kanska hjá báðum pørtum.

10. juni høvdu teir næstan fult skip. - Okkum vantaði eini 5 tons í last. Sofus ætlaði at fara inn í Føroyingahavnina eftir eitt sindur av salti og olju, so skuldi kósin setast heim.- Eg gloymi ikki henda vanlukkudag 13. juni 1954, so leingi eg livi, segði Hjalmar

Hjalmar hevði frívakt, bleiv útpurraður kl 6:00 á kvøldið til deksvakt. Vit fóru so aftur at

skaffa. Hjørdis var ein umbygd skonnart og hevði heila keys. Smeltihúsið var aftur á hekkuni, so kom kokkhúsið, messan, maskirúmið og frammi í keysini eitt kamar til 1. meistara. Opið var millum smeltihúsið og keysina. Her var ein durur í bagborðssíðu, so komast kundi inn til kokkhúsið og messuna, men tú skuldi gjøgnum messuna og maskirúmið fyri at koma fram til kamarið hjá 1. meistara. Steingrim Petersen var 1. meistari, ættaðaður úr Oyndarfirði búsitandi í Leirvík. Hann hevði frívakt og lá og svav.

Viggo Johannesen, Viggo á Hædd, var kokkur. Hjalmar sigur við Viggo, at vit síggjast skjótt aftur, trolið verður ikki meira enn komið á botn, so komi eg aftur at fáa mær kaffi. - Tað var í lagi, svaraði Viggo.

Meðan teir skutu, heitti Hjalmar á Theodor Johannesen 2. stýrimann um at sleppa fram á dekkið at blóðga fiskin, teir høvdu fingið, sum lá í pavninum. Hetta var í lagi. So varð skverað og koyrt fulla ferð á motorin, síðani loraðu teir veirin ... tað hvein í rullunum, so nógv stóð á. Tað var gott veður. - Eg var ikki í oljuklæðum, men troyggju og gummistyvlum. Hevði blóðgað einar tveir fiskar og skuldi rætti meg eftir tí triðja fiskinum, men var áhaldsin og datt. Veirurin kom fram eftir miðjum dekki í eina rullu, sum stóð við síðuna av mastrini og í eina deksrullu næst gálganum. Hjørdis kundi bara trola í Stýriborð.

Hjalmar sær at hetta verður galið. Hann var góður fótbóltspælari og vildi brúka allar snildir ikki at detta niður á veirin. Hendi tað, so fór hann í rulluna. Hann tekur hondina fyri seg niður á skivuna, ið mól runt í á rulluni. Tummilin fer í rulluna og kvettist av, men løgið tykist tað Hjalmari, at hann kom á føtur aftur, men so var. Hjalmar var í